# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo



Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo



Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo



Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo



Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Neystabø hevur takkað fyri seg

Á eykaaðalfundi í B36-húsinum fríggjakvødlið, har 30 limir vóru møttir, var nevndarval. Kristian á Neystabø, Kjartan Mohr og Edvard Heen takkaðu fyri seg í nevndini, og eftir uppskoti frá formanninum, Sámali Ímundssyni, vórðu Jákup Mørk, Hans Debes og Hákun Steingrimsson valdi í nevndina. Fundurin takkaði fráfarandi nevndarlimunum fyri trúgva tænastu.



*Savnsmynd*

**»Um onkur hevur tørv á at seta niður á teg, fyri sjálvur at gerast betri, ja, so gera teir tað**

BOGI LØKIN,
NSÍ OG FØROYAR



**»Hvørja einastu ferð, eg havi verið við til at sungið tjóðsangin saman við landsliðnum, hevur tað verið ein stór og eisini serlig kensla**

EGIL Á BØ,
EB/STREYMUR OG FØROYAR

# NSÍ brynjar seg til 2011



*Runavískingar hava styrkt sær hópin við m.a. Mamuka Toronjadze frá niðurflytarunum úr FC Suðuroy*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR** NSÍ avdúkaði um vikuskiftið, at Mamuka Toronjadze og Ismail Abdul Razak eru knýttir at hópinum

Uni Holm Johannesen

Fótbóltsfelagið NSÍ hevur skrivað sáttmála við tveir útlendingar. Mamuka Toronjadze og Ismail Abdul Razak.

Við sáttmálunum brynjar felagið seg til at stríðast um gullmerkini næsta kappingarár. Talan er um tveir leikarar, sum hava fortreytirnar at gerast profilar í føroysku landskappingini.

### Hevur prógvað sítt virði

Mamuka Toronjadze var millum mest eyðsýndu leikararnar í Vodafonedeildini í ár.

Hann spældi 27 dystir fyri FC Suðuroy og skeyt sjey mál. Liðið flutti niður, men Toronjadze hevur ikki hug at spæla í næstbestu deildini.

Hann er ættaður úr Georgia og er 24 ára gamal. Hann hevur áður umboðað FC Tbilisi og FC Dila Glori í heimlandinum.

Hann er framrættaður miðvallari og framherji.

### Úr bestu deildini

Ismail Abdul Razak er navnið á miðvallaranum, sum ætlandi skal hjálpa NSÍ næsta ár.

Hann er 21 ára gamal og ættaður úr Ghana.

Sambært heimasíðuni hjá NSÍ, og soccerway.com, hevur Razak verið millum teir fyrstu ellivu hjá Hapoel Arce í 10 av 12 landskappingum í hesum kappingarárinum.

Hapoel Arce er í løtuni nummar fimm í bestu deildini í Ísrael. Hann varð skiftur út í hálvleikinum í gjár, tá Hapoel Arce tapti 3-2 fyri Hapoel Be er Sheva á heimavølli.

Ismail Abdul Razak hevur eisini fingið seg royndan á ungdómslandsliðum hjá Ghana.

*uni@sosialurin.fo*

# *Miðlarnir skriva...*

*»Lagnudystirnir hjá kyndilskvinnum at náa finaluplássi eru tann 1. desembur og 12 desembur, tá ið tær spæla ávikast ímóti Stjørnuni í Havn og Tjaldri í Runavík.«*

**www.neistin.fo**

*»Endaliga støðan gjørdist 28-21, og serliga kundu vit í dag takka Heidi Mariu og Jórun fyri, at so væl gekst hóast alt, tí tær tóku ábyrgd, tá á stóð, og skutu sjey mál hvør.«*

**www.kyndil.fo**

*»Ein flott betring hjá unga havnarmanninum, hóast hann hevur stríðst við sjúku í seinastuni.«*

**www.svimjing.com um Magnus Jákupsson**

*»Eitt megnarbragd hjá ungu Tanju, sum her setur juniormet hóast hon fyrst um gott eitt ár fer at hava veruligan junioraldur.«*

**www.svimjing.com**